HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

# Løgfrøðingur til Heilsu- og innlendismálaráðið
**(avloysarastarv)**

Heilsu- og innlendismálaráðið søkir eftir einum løgfrøðingi til setan skjótast gjørligt. Talan er um eitt avloysarastarv fyri løgfrøðing í farloyvi til 30. november 2018.

Heilsu- og innlendismálaráðið er fyrisiting hjá landsstýriskvinnuni í heilsu- og innlendismálum. Ráðsuppgávurnar fevna um at ráðgeva landsstýriskvinnu og leiðslu, at umboða ráðið í tvørgangandi samstarvi, og at lýsa og avgreiða mál, ið hoyra stjórnarráðnum til. Í hesum starvi kemur tú serliga at arbeiða við uppgávum innan heilsuøkið, men talan kann eisini verða um uppgávur innan onnur øki.

**Førleikar**
Tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv. Tú hevur áhuga fyri økjunum, ið Heilsu- og innlendismálaráðið umsitur, og ynskir at arbeiða við at menna og dagføra økini. Tú skalt duga væl at orða teg á føroyskum, bæði í skrift og í talu, og er tað ein fyrimunur, um tú hevur politiskt tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum sum heild.

**Arbeiðsuppgávur**
Sum fulltrúi kemur tú at arbeiða sjálvstøðugt. Høvuðsuppgávurnar verða løgfrøðilig ráðgeving, lógar- og kunngerðarsmíð, málsviðgerð, greining, gera hoyringssvar, svara fyrispurningum frá Løgtinginum og at tulka lógir og reglur. Harumframt at umboða stjórnarráðið í møguligum arbeiðsbólkum og samstarvsfora.

Starvið er mennandi og við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Hóast starvið er sjálvstøðugt og ábyrgdin stór, so verða uppgávurnar eisini loystar í toymum og í samstarvi við aðrar starvsfelagar í ráðnum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Heilsu- og innlendismálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Heilsu- og innlendismálaráðið**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**

ella umvegis teldupost á **himr@himr.fo**

**Umsóknarfreist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. desember 2017,  kl. 12:00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jan Simonsen, deildarstjóra, tlf. 304050 ella umvegis teldupost til jan.simonsen@himr.fo.

*Heilsu- og innlendismálaráðið umsitur heilsumál, orkumál, kommunumál, umhvørvismál og familjurættarlig mál, og veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika.*